


- Granskingarevni
- Ph.D. verkætlanir
- NVD greinasavn
- Granskingarstovnar
- Greinarøð í bløðunum
- Vísindasøgur
  - Størri atlit til genetiska fjølbroytni
  - Íløgur í gransking í mun til BTÚ minka
  - Framvegis lítið til av toski á Bankanum
  - Dálking á Havnarvág
  - Er jarn avmarkandi fyri vøkstur í havinum?
  - Master samskipari og lestrarvegleiðari á vitjan.
  - FLL 2007 kapping
  - Føroyska bládúgvan
  - Føroyska músin
  - Væleydnað seismikkferð við Magnusi Heinasyni
  - Phd_verja av alduverkætlan
  - Føroyar liggja á kantinum
  - FLL 2006 kapping
  - 163 toskar í 29 hálum á Føroyabanka
  - Toskur: ein útbrótari
  - Gróður ávirkar kreftir
  - NVD á US Naval Academy
  - 10 dagar frá Tjernobyl
  - Seismikkur á Glyvursnesi
  - Norskur ríkmaður stuðlar gransking í heimbýi sínum
  - FLL kapping
  - Balinski fyrstu ferð
  - Mest geislavirkni í Hvalvík og minst í Hvalba
  - KT-nýskapan krevur útbúgving, gransking og samstarv
  - Miðalvekt á føroyskum seyði
  - Tøknifrágreiðing: Frá atkvøðum til tingsessir
  - Írsk forbindelse?
  - **Føroyabanki**
  - Alda og streymur
  - Fuglar í Viðarlundini
  - Fiskimiðasavn og kortplottari við streymkorti fyri nærleiðirnar.
  - DNA-kanningar
  - Streym til drívskipanir
  - Seismiskar kanningar á Glyvursnesi
  - Útgerð til aling á harðbalnum økjum
  - Grannljómarin
  - Geislavirkni regnaði yvir Føroyar
  - Kjafturin á føroyabankatoskinum
  - Gráspurvurin
  - Føroysk mjólk
  - Seismiskar kanningar í Vestmanna

# Føroyabanki – eitt vakstrarparadís hjá fiski

**Fiskasløgini, sum alt sítt lív eru á Bankanum, vaksa í miðal 27% skjótari, enn aðrastaðni, har hesi fiskasløgini finnast. Hjá teimum sløgunum, sum ikki hava fast tilhald á sjálvum Bankanum, er vøksturin væl lægri.**




Hetta kom fram á fyrilestrinum, sum Eyðfinn Magnussen helt í Nóatúni hóskvøldi 21. apríl. Fyrilesturin bygdi á kanningar, sum Eyðfinn hevur gjørt á Føroyabanka síðani 1992. Fyrilesturin hevði heitið: **Føroyabanki - eitt vakstrarparadís hjá fiski**, og var ein samanbering av vøkstrinum hjá fiski, sum livir á Føroyabanka í mun til hvussu hesi fiskasløgini vaksa aðrastaðni.




Rákið á Bankanum er soleiðis háttað, at sjógvurin í stóran mun heldur seg inni á Bankanum. Á hendan hátt er Føroyabanki ein sjálvstøðugt vistfrøðilig skipan, har umhvørvið hevur sett síni serstøku eyðkenni á fleiri fiskasløg og aðrar livandi verur, ið eru á Bankanum. Kendasta av hesum er helst "bankatoskurin". Tað hevur leingi verið kent, at toskurin á Føroyabanka veksur óføra skjótt. Ja, so skjótt, at hann telist millum skjótast vaksandi toskasløgini í heiminum. Men hví veksur toskurin á Føroyabanka so skjótt? Er tað okkurt serligt við bankatoskinum, ella er tað umhvørvið á Bankanum, sum skapar tann góða vøksturin? Hesir báðir áhugaverdu spurningarnir vórðu viðgjørdir í fyrilestrinum.







**Eru vakstrarumstøðurnar framúr góðar á Bankanum?**

Eyðfinn segði, at tað eru serliga føði og hiti, sum stýra vøkstrinum hjá fiski, men tann genetiski komponenturin hevur eisini týdning: Heitari sjógvurin er, og meira fiskurin hevur at eta, skjótari veksur hann. Eru vakstrarumstøðurnar serstaka góðar á bankanum, átti hetta tí eisini at sæst aftur hjá hinum fiskasløgunum, ið finnast á Bankanum.

**Samanbering við vøksturin aðrastaðni**

Til at fáa greiðu á hesum spurningi hevur Eyðfinn kannað vøksturin hjá 14 ymiskum fiskasløgum á Bankanum, og samanborin við, hvussu hesi fiskasløgini vaksa aðrastaðni í heiminum. Samanberingin fevnir um úrslit frá 62 ymiskum kanningum frá 35 ymiskum økjum. Tey 14 fiskasløgini vórðu býtt sundur í 2 bólkar: Tey sløgini sum eru alt sítt lív á bankanum, og so tey ferðandi fiskasløgini, sum bert ein part av lívinum eru á bankanum. Um tað er okkurt serstakt við umhvørvinum á Bankanum, kann væntast, at vøksturin hjá teimum fastbúgvandi fiskasløgunum skilja seg burtur úr vøkstrinum hjá líknandi sløgum aðrastaðni, meðan tey ferðandi fiskasløgini ikki vaksa øðrvísi.

Og tað var júst tað, sum kanningin vísti. Tey fastbúgvandi fiskasløgini á bankanum vaksa í miðal 27% skjótari enn aðrastaðni, meðan vøksturin hjá teimum ferðandi sløgini er á sama støði sum aðrastaðni.

**Dýpið avgerandi fyri vøksturin**

Vøksturin er tó tengdur at dýpinum, har fiskurin livir. Tað er týðiligt, at tað eru tey fiskasløgini, sum liva uppi á sjálvum Bankanum, sum hava tann besta vøksturin. Djúpari vit fara, seinri veksur fiskurin. Grundin til hetta er ivaleyst, at á størri dýpi gerst sjógvurin kaldari, og at vit tá heldur ikki longur eru á sjálvum Bankanum: Sjálvur Føroyabanki strekkir seg út á umleið 200 m dýpi. Kanningar hava eisini víst, at tað er serliga her, at sjógvurin er støðufastur og melur í klingur.

**Tunga og knurrhani vaksa seint**

Tað er eisini á tí grunna partinum av Bankanum, at vit finna nógva nebbasild og hægguslokk. Hesi eru høvuðsføðin hjá toski og hinum størru fiskasløgunum, sum halda til har, og eiga ivaleyst ein stóran part av heiðrinum fyri tann góða vøksturin vit finna hjá fiskasløgunum, sum halda til í hesum økinum. Nebbasild og hægguslokkur eru tó ov stór at eta hjá tungu og knurrhana. Hesi bæði fiskasløgini liva vanliga av bustmaðkum og smáum krabbadýrum. Hesum er ikki so nógv til av á Bankanum, og er hetta helst eisini orsøkin til, at vøksturin hjá tungu og knurrhana tí ikki skara framúr á Føroyabanka.

Eyðfinn segði, at tá vit vita, at tað er serliga føði og hiti, sum stýra vøkstrinum hjá fiski, eru tað helst eisini hesi, sum eiga ein stóran part av heiðrinum fyri tann góða vøksturin hjá fiskinum á sjálvum bankanum, tí hesar umstøðurnar eru jú sera góðar á Føroyabanka.

Her síggjast glærurnar frá fyrilestrinum.

**Annað skrivligt tilfar um Føroyabanka fæst við at trýsta her .**

Les greinina "Føroyabanki eitt vakstrarparadís hjá fastbúgvandi fiski", sum stóð í Vinnuvitan 23. august 2007.

Vilt tú vita meira um Føroyabanka, set teg í samband við Eyðfinn Magnussen

tel 352 559 ella 352 550

E-mail EydfinnM@Setur.fo